# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30. september 2024 |
| Mál nr.: | 24/21089-2 |
| Málsviðgjørt: | BÁT |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 19.09.2024 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at seta úr gildi løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening**

**§ 1.** Løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspening verður sett úr gildi.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.
*Stk. 2.* Umsókn um stuðul til uppihaldspening, ið fevnir um uppihaldspening goldin í 2024, skal vera latin inn áðrenn 1. juli 2025 og verður viðgjørd eftir reglunum, sum høvdu gildi áðrenn 1. januar 2025.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Almenni útreiðsluvøksturin skal tálmast. Sum ein liður í sparitiltøkum í sambandi við fíggjarlógina fyri 2025, er ætlanin, at tey, sum gjalda uppihaldspening, ikki longur skulu hava rætt til stuðul til hesa útreiðslu.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening hevur til endamáls at veita stuðul til persónar sum gjalda uppihaldspening til hjúnarfelaga og ella til børn yngri enn 18 ár. Árliga stuðulsupphæddin er 40 % av tí uppihaldspeningi, sum persónurin er álagdur at gjalda og hevur goldið. Stuðulin verður bert veittur fyri goldnu upphæddina, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn. Stuðul verður sostatt ikki veittur, um persónurin bert rindar vanligt barnagjald til eitt barn.

Flestu persónar, ið fáa stuðul til uppihaldspening, rinda vanligt barnagjald. Vanligt barnagjald í 2024 er 1.162 kr. fyri hvørt barnið. Ein persónur, ið t.d. rindar barnagjald fyri trý børn, rindar sostatt 3.486 kr. um mánaðin. Av hesum fær hann stuðul til 40 % av gjaldinum til tvey av børnunum, svarandi til 930 kr. um mánaðin ((1.162+1.162)x0,4).

Samlað tal av persónum, sum seinastu trý árini hava móttikið stuðul til uppihaldspening:

| | |
|---|---|
| 2021 | 220 |
| 2022 | 213 |
| 2023 | 206 |

Nærum øll, sum fáa stuðul til uppihaldspening, fáa fyri goldið barnagjald. Tó eru einstakir borgarar, ið fáa stuðul í sambandi við goldið hjúnafelagagjøld.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at minka um útreiðslu landskassans.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening verður sett úr gildi, og rætturin til stuðul dettur harvið burtur.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið sent til ummælis.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans lækka. Tá broytingin í 2026 hevur fingið fullan virknað er árliga sparingin uml. 2.700 tús.kr.

Tær flestu útreiðslurnar til stuðul fyri uppihaldspening falla í ár, men av tí, at tey, sum eru áløgd at gjalda uppihaldspening fyri 2024, kunnu søkja um stuðulin fram til 1. juli 2025, er ein ávís útreiðsla til hetta á fíggjarlógini fyri 2025.

Mett verður, at sparingin á fíggjarlógini fyri 2025 verður 2.500 tús. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Almannaverkið viðger umsóknir til stuðul til uppihaldspening. Við uppskotinum skal Almannaverkið ikki longur viðgera hesar umsóknir, men um tað verða fleiri mál, har annar parturin verður álagdur at gjalda, og Almannaverkið skal leggja út, kann hetta hava umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið.

Somuleiðis kann tað hava ávísar avleiðingar fyri Familjufyrisitingina, tá ið upphæddin skal ásetast.

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar við sær fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

**1) Hoyvíkssáttmálin**

Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið verður ikki mett at stríða ímóti Evropeiska mannarættindasáttmálanum.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ongar kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Nei.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Nei.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Við lógaruppskotinum verður ikki longur møguligt at søkja um stuðul upp á 40 % fyri goldnan uppihaldspening, sum er hægri enn vanligt barnagjald til eitt barn. Uppskotið kann tí fáa avleiðingar fyri tey foreldur, sum gjalda uppihaldspening til fleiri børn ella gjalda eitt hægri barnagjald.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Løgtingslógin setir úr gildi galdandi lóg um stuðul til uppihaldspening.

**Til § 2**
Løgtingslógin verður sett úr gildi 1. januar 2025. Tó er ein skiftisregla sett inn, sum ger, at tey, sum hava goldið uppihaldspening í 2024, kunnu søkja um stuðulin eftir gomlu lógini um stuðul til uppihaldspening. Sostatt kunnu tey, sum hava goldið uppihaldspening í 2024 og høvdu rætt til at søkja um stuðulin, søkja um hetta fram til 1. juli 2025.

Almanna- og mentamálaráðið, 30. september 2024

**Sirið Stenberg,**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen